# Fagnaðardagur á Selatrað

# 2. hvítusunnudag

## kl. 13⁰⁰ - 17⁰⁰



**Unnið tykkum ein góðan dag á Skótadeplinum á Selatrað - við allari familjuni.**

2. hvítusunnudag verður møguleiki hjá øllum familjum og øðrum áhugaðum at koma á Skótadepilin, tí henda dagin fara skótabólkarnir kring landið at skipa fyri nógvum ymiskum tiltøkum.

**Hetta vikuskiftið er eisini LPK, sum er landspatrúljukappingin hjá KFUM-skótunum, so tit fáa eisini møguleikan av vera hjástødd, tá ið patrúljan, sum vinnur, verður heiðrað.**

Endamál okkara, við fagnaðardegnum á Selatrað, er at skipa fyri einum familjudegi og at fáa til vega pening til liðuggerð av Skótadeplinum.

***Nógv tiltøk á skránni. Byrjað verður kl. 13⁰⁰***

- *fiskibrunnur*
- *rør-skreiðibreyt*
- *matsøla og café*
- *gandatjald*
- *primitiv matgerð*
- *skjótibreyt*
- *svampakast*
- *pílakast*
- *poppcorn á bálið*
- *klintring*
- *tombola*
- *lutaseðil við nógvum vinningum*

**Ferðasamband millum Hósvík og Selatrað**

| Úr Hósvík: | Av Selatrað: |
|---|---|
| kl. 13.00 | kl. 14.30 |
| kl. 14.00 | kl. 15.30 |
| kl. 15.00 | kl. 16.30 |
| kl. 16.00 | kl. 17.30 |

*Heitt verður á tey, sum koma til Selatraðar við bili, um at ansa eftir seyði millum Kolbanargjógv og Selatrað.*



**Vælkomin at vitja á Skótadeplinum á Selatrað 2. hvítusunnudag.**

**KFUM-SKÓTARNIR Í FØROYUM**

*- ein virkin barna- og ungdómsfelagsskapur*

# Kontorelev på Rigsombudet

Rigsombudet søger en kontorelev indenfor området »Offentlig forvaltning – Stat«. Stillingen ønskes besat 1. august i år eller efter nærmere aftale.

**Vi forventer**
- at du har en god FHS- eller HH-eksamen
- at du er god til at formulere dig mundtligt og skriftligt, på såvel færøsk som dansk
- at du er selvstændig, initiativrig og har gode samarbejdsevner
- at du har kendskab til word eller andet tekstbehandlingsprogram

**Vi tilbyder**
- en god og kvalificeret elevplads med et veltilrettelagt uddannelsesforløb der berører alle Rigsombudets kontorfunktioner
- mulighed for deltagelse i den egentlige sagsbehandling på det familieretlige område
- løn efter overenskomst mellem Finansministeriet og HK-forbundet i Danmark.

For elever med FHS-eksamen er elevtiden 3 år mens den er 2 år for elever med HH-eksamen. Elevtiden omfatter i alt 15 ugers skoleophold i Danmark. Rejse og ophold betales af Rigsombudet.

Du kan få yderligere oplysninger om stillingen ved at henvende dig til kontorfuldmægtig Anna Weihe eller fuldmægtig Hroar Kolmos, Rigsombudet, på telefon 311040, bedst mellem kl. 10-15.

Skriftlig ansøgning med kopi af eksamenspapirer m.v. sendes til Rigsombudet, Postboks 12, 110 Tórshavn. **Ansøgningsfristen er mandag d. 10. juli.**

**Rigsombudsmanden på Færøerne**

**Vibeke Larsen**

# Lærarastørv SKÚLIN VIÐ ÓSÁNNA

Til skúlaárið 2000/2001 verður søkt eftir 5 møguliga 7 lærarum. Størvini, sum eru tíðaravmarkað, verða lønt samb. avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 til 27.4.

Umsóknir skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 19. juni 2000.

**Klaksvíkar Skúlanevnd**
v/ Ingun Joensen, form.
700 Klaksvík

# Diesel bilur til sølu



Audi A3 - TDI - árg. 97, koyrt 70.000 km, í sera góðum standi, til sølu. Hevur sportsfelgur og CD-spælara.

**Tlf. 311960** ella **213061**

# Lærarastørv til Gøtu Skúla tíðaravmarkað fyri skúlaárið 2000/2001

Fyri fyrstalærara í farloyvi verður søkt eftir vikari í hansara stað fyri skúlaárið 2000/2001.

Somuleiðis verður søkt eftir einum til tveimum lærarum at undirvísa uml. fulla tíð tíðaravmarkað fyri skúlaárið 2000/2001.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1. til 27.4.

Umsóknir saman við ljósriti av próv- og ummælisskjølum skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 26. juni kl. 18.

**Gøtu Skúlanevnd**
Sigvør Gregersen, form.
FO 512 Norðragøtu



# Klaksvíkar Sjómansskúli

Í august 2000 byrja hesi skeið:

## Skipskokkaskeið:





Útbúgvingin gevur øktan førleika at virka sum skipskokkur á føroyskum fiskiskipi.

Kokkaútbúgvingin leggur m.a. dent á, at næmingar læra føðslulæru og reinføri, at proviantera, matgerða og borðreiða. Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varðar 20 vikur. Ongar upptøkutreytir eru til at sleppa inn.

Skeiðið, ið byrjar í august 2000 er fullteknað.

## Sjóvinnuflokkur:



Við hesum skeiði fæst atgongd til framhaldandi lestur til heimaskipara, um tygum eisini hava ta neyðugu siglingartíðina. Nærri upplýsingar hesum viðvíkjandi fáast við at venda sær til skúlan.

Møguleiki verðu eisini at taka dugnaskaparskeið í sigling, ið gevur rætt til at føra skip upp til 100 tons út á 30 fjóðringar úr landi.

Í lærutíðini verða skeið tikin innan trygd og fyrstuhjálp.

Skeiðið varðar 20 vikur. Tað eru ongar upptøkutreytir til at sleppa inn á kokkaskúlan.

Enn eru 2 pláss eftir á skeiðinum, ið byrjar í august 2000.

Umsóknarbløð fáast við at venda sær til skúlan tlf: 456128 fax: 457917 ella á telduposti: klaknav@klaknav.fo
Eisini kunnu tit vitja heimasíðu okkara: www.klaknav.fo

Sosialurin - 311820

# Kollafjarðar Skúli

Søkt verður eftir einum, møguliga tveimum lærarum til tíðaravmarkað starv/størv við Kollafjarðar Skúla fyri alt skúlaárið 2000/20001.

Starvið/størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið, lønarflokkur frá 18.1 til 27.4.

Umsóknirnar skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi leygardagin 24.06.2000 á middegi.

**Kollafjarðar Skúlanevnd**
v/ Arnbjørn Kristiansen
410 Kollafjørður

# Pedagogur
## til Dagstovnin í Fuglafirði

Søkt verður eftir 3 pedagogum, 35 t. viku.

2 pedagogar at byrja 1.8.2000, ella skjótast tilber.
1 pedagog at byrja 1.9.200, ella skjótast tilber.
Størvini eru á stovu við 12 børnum í aldrinum 0–3 ár.

Lønin verður sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til leiðaran í dagstovninum tlf. 444940 / 225222.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 26. juni kl. 10.00.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður, 9. juni 2000

**Fuglafjarðar býráð**



# DAGRØKTARAR TIL TÓRSHAVNAR KOMMUNU

Sum dagrøktari í Tórshavnar kommunu fært tú eitt sera sjálvstø›ugt og fjølbroytt starv. Starvi› er væl lønt og krevur ein professionellan hugbur› til barnauppaling. Frá kommununi fært tú fakligan stu›ul, skei›, rá›geving frá økispedagogum, atgongd til spælistovur, fimleikahallir, svimjihyl og bókasavn.

Tórshavnar kommuna
Dagrøktarskrivstovan
Telefon 315160 lokal 223
Kirkjuvegur 1
100 Tórshavn

stephanssons hús tlf. 314291

HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

# Hjálparfólk

Í.s.v. at Heilsufrøðiliga starvsstovan fer undir at kanna alifisk fyri heilivágsleivdir, sambært galdandi ES fyriskipan, verður søkt eftir hjálparfólki.

Starvið, sum er fulla tíð, fevnir um hesi økir:
- Sýnistøku og aðrar eftirlitsuppgávur
- Fyrireiking og goymslustýring av sýnum
- Senda sýnir til starvsstovur uttanlands og lata sýnir til okkara egnu starvsstovu
- Móttaka og viðgera úrslit av starvsstovukanningum

Tú skalt hava lokið prógv sum
- Laborantur ella
- Hægri útbúgving innan fiskivinnu (HIF) ella
- Tilsvarandi útbúgving

Royndir innan vanligar starvsstovukanningar, sýnistøku, góðskustýring og EDV á brúkarastøði eru fyrimunir. Eisini er kunnleiki til alivinnuna ein fyrimunur.

Tú skalt hava koyrikort. Somuleiðis skalt tú hava góð samstarvsevni, vera nærlagdur/nærløgd og duga at arbeiða miðvíst og sjálvstøðugt.

Starvið verður sett sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið og byrjast skal skjótast møguligt.

Starvssetanin er fyribils; til og við 28. februar 2001.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Dánial K. Christiansen ella Bárð Enni á tlf. 315300.

Umsóknir til starvið, við avriti av prógvum, starvsroyndum og møguligum viðmælum, skal vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 26. juni 2000.

FOOD AND ENVIRONMENTAL AGENCY

Debesartrøð
FR-100 Tórshavn
Faroe Islands
Tel. +298 31 53 00
Fax. + 298 31 05 08
E-mail: feagency@hfs.fo